


# Semja um beinleiðis sendingar

Eftir trý ár í sáttmálaloysi hevur Kringvarpið nú gjørt sáttmála við ÍSF um loyvi til at senda beinleiðis frá ítróttarhendingum. Rættindini hava annars verið í ongamannalandi seinastu trý árini, tó at partarnir alla tíðina hava virkað eftir gamla sáttmálanum. Nú er nýggjur sáttmáli tó loksins gjørdur, og hesin inniheldur ikki nakað gjald fyri loyvi at senda. Hinvegin hevur Kringvarpið bundið seg til at senda ávísar ítróttahendingar, uttan at stovnurin tekur gjald fyri hetta. Sambært gamla sáttmálanum rindaði Kringvarpið 300.000 krónur um árið, men hinvegin vóru fleiri dømi um, at stovnurin ikki vildi senda beinleiðis, um partur av hesum ikki varð goldin av avvarðandi sersambandi. Dømi um hetta vóru hond- og flogbóltsfinalurnar. Tó skal Kringvarpið gjalda 300.000 fyri tað, sum er sent í 2009, nú nýggi sáttmálin ikki er gjørdur, fyrr enn árið er mest sum liðugt.

Tí kann staðfestast, at íløgurnar eru næstan burtur, men raksturin er 20 milliónir krónur størri enn hann var í 2009 og 40 milliónir krónur størri, enn fíggjarlógaruppskotið legði upp til.







## Vinnumálaráðið

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2010 varð lagt upp til, at Vinnumálaráðið skuldi fáa ein minni prosentpart av fíggjarlógini í 2010. Men soleiðis bleiv ikki.

Íløgujáttanin varð við triðju viðgerð av fíggjarlógini nærum tvífaldað til 10 milliónir krónur, grundað á eina ognartøku til flogvøllin, sum eisini skal geva eina inntøku.

Harafturat verður raksturin eisini vaksin í Vinnumálaráðnum í mun til fíggjarlógaruppskotið. Har ímillum er ein eyka rakstrarjáttan til Strandferðsluna á 19,6 milliónir krónur, tað, sum fyllir mest.

Tað vil við øðrum orðum siga, at Vinnumálaráðið hevur fingið umleið 6,6 prosent av fíggjarlógini at umsita, og tað eru 0,2 prosentstig meira, enn fíggjarlógaruppskotið legði upp til.

## Mentamálráðið

Í mun til fíggjarlógaruppskotið hevur Mentamálaráðið mist yvir 20 milliónir krónur. 10 milliónir krónur av hesum vóru til ítróttar og mentanarverkløg. Tað vil siga stuðul til ítróttarhallir og mentanarhús. Harafturat eru 5 milliónir krónur færri til Skúladepilin við Marnagil, 1,5 millión blivnar burtur til tjóðleikhús, umframt aðrar smærri íløgur. Hinvegin skuldi Mentamálaráðið upprunaliga umsita yvir 57 milliónir krónu í íløgum, sum er tað næstmesta nakað ráð fekk í uppskotinum.

Í mun til uppskotið er raksturin somuleiðis skorin við 3,8 milliónum krónum, og her ímillum hevur fólkaskúlin fingið tvær milliónir krónur færri.

Í mun til upprunauppskotið hevur Mentmálaráðið mist so mikið nógv, at tað enntá hevur minni part av fíggjarlógini enn í 2009, um vit hyggja at prosentbýtinum. Og í mun til upprunauppskotið fyri 2010 hevur Mentmálaráðið mist umleið eitt prosentstig.

## Heilsumálaráðið

97,7 milliónir krónur fekk heilsuverkið afturat til rakstur, tá fíggjarnevndin hevði verið inni í viðgerðini. Harav stava 108,7 milliónir krónur av heilsutrygdarveitingum, sum tó nærum alt skal koma innaftur í gjøldum til heilsutrygd. Hinvegin er aðrar rakstrarjáttanir eru skerdar eitt vet í mun til fíggjarlógaruppskotið.

Hinvegin vera játtanirnar til íløgur 57 milliónir krónur, sum eru sama tal, sum uppskotið legði upp til. Hetta er millum annað til útbygging av landssjúkrahúsinum.

Í mun til fíggjarlógina 2009 hevur Heilsumálaráðið fingið 126,5 milliónir krónur afturat at umsita og umleið 2 prosentstig afturat av fíggjarlógini.

## Almannamálaráðið

Størsti posturin á fíggjarlógini eru eisini sambært endaligu fíggjarlógini almannamál. Ráðið fær nevniliga til samans 1.703.619.000 krónur. Hetta svarar til 36,5 prosent av samlaðu fíggjarlógini.

Verður samanborið við fíggjarlógina 2009, fær Almannamálaráðið 104.565.000 krónur afturat, og samanbera vit við fíggjarlógaruppskotið, fær ráðið umleið 36 milliónir krónur afturat.

Raksturin í játtanini í almannamálum er vaksin við umleið 80 milliónum krónum, men helvtin av hesum kemur av, at studningslán til eldrabústaðir á 42 milliónir krónur nú eru rakstur.

Hin stóri posturin í rakstrinum kemur av, at pensjónsreformurin ikki bleiv til nakað á hesum sinni.

## Innlendismálaráðið

Annika Olsen hevur mist nógvan pening fíggjarlógini, um samanborið verður við fíggjarlógaruppskotið, og enn meira, um samanborið verður við fíggjarlógina 2009.

Íløgujáttanin er skorin við 71,8 milliónum í mun til 2009 og við 43 milliónum krónur í mun til uppskotið til fíggjarlóg.

Hetta kemur fyrst og fremst av, at nógv asfalt er tikið av fíggjarlógini. Harafturat eru 3 milliónir krónur skornar í mun til fíggjarlógaruppskotið sum íløgur, men eru flutt til rakstur, sum stuðulsjáttanir. Afturat øllum hesum koma eisini 5 milliónir krónur, sum eru tiknir burtur av umvælingum av almennum bygningum.

Raksturin er eisini skorin í mun til 2009, men tað er mest orsakað av, at 42,5 milliónir krónur eru færri til Norðoyatunnilin, sum er liðugt goldin, og sum hevur staðið sum ein rakstrarjáttan.

## Uttanríkisráðið

Minsta ráðið í peningi er Uttanríkiráðið. Ætlanin í fíggjarlógaruppskotinum var, at ráðið skuldi fáa umleið 3 milliónir krónur afturat í játtan, men henda játtan er í viðgerðini skorin í helvt, so ráðið endaliga fær umleið 48 milliónir krónur.